## Ferguson bíðar

Venjarin hjá Manchester United ætlar sær ikki at keypa spælarar, tá ið flytingarvindeygað letur upp í januar. - Vit eru í somu støðu sum í summar. Tað eru nógvir spælarar har úti, sum verða mettir til at hava virðið uppá 500 milliónir krónur. Sæð í ljósinum av hesum prísum, so er tað ikki realistiskt, at vit keypa nakran spælara, sigur Alex Ferguson við SportingLife. Seinastu tíðina hevur verið róð fram undir, at United er áhugað í Everton-talentinum Jack Rodwell.



## Chelsea togar í Hiddink

Niðurlendinguri Guus Hiddink, sum fyrr í ár hjálpti Chelsea eitt skifti, er framvegis ein populerur maður í felagnum. Hiddink er annars russiskur landsliðsvenjari, men hevur møguleikan at steðga í hesum samstarvi nú. Nú vilja fjølmiðlar verða við, at Chelsea roynir at lokka Hiddink til felagið, og at hann skal hava ein álitissess í felagnum aftanfyri venjaran Carlo Ancelotti.




Vestmenningar fingu nýgg flog undir veingirnar, tá teir við knúsandi sigri sendu strandingar heim við ongum

Mynd: Álvur Haraldsen

### VÍF-StÍF 35-25 (17-11):

# VÍF reistist aftur

**Hin 11. oktober í ár vann VÍF á útivølli móti StÍF. Síðan hava vestmenningar tapt fýra ferðir upp í slag, men í gjár bar aftur til, tá júst StÍF vitjaði í Vestmanna**




Uni Holm Johannesen

Við fýra ósigrinum upp í slag hevur VÍF seinastu vikurnar av álvara nærkað seg aftasta plássinum. Og við stríðshugaðum kollfirðingum andandi í bakið, varð neyðugt hjá vestmenningum at fáa fult, tá StÍF vitjaði í gjár. Og tað eydnaðist.

VÍF vann fyri fyrstu ferð síðan 11. oktober, tá teir vunnu á útivølli móti StÍF. Úrslitið gjørdist 35-25 eftir hálvleiksstøðuna 17-11.

Høvuðsorsøkin, at tað riggaði so væl hjá VÍF var, at tað eydnaðist at verja fyri rumenunum Christian Preda og Gabriel hjá StÍF. Teir fingu sera lítið pláss og tí var lítið bit í álopsspælinum hjá gestunum.

18 ára gamli Bjarti Hansen stóð serliga sterkur í myndini, og frá vonginum fekk hann heili 10 mál. Toppskjúttar hjá StÍF vóru Mortan Hansen og Leivur Justinussen, sum skutu seks mál hvør.

## Legði orkuna í verjuspælið

Heini Hanusarson noyddist at hyggja at frá miðjum vølli í stórum løtum av dystinum. Hann var í heilum mansvardur av gestunum og tískil tók hann sera lítið lut í álopsspælinum.

- Tí noyddist eg at leggja orkuna í verjuspælið, og tað riggaði væl. Verjan stendur sera væl, og vit eru snildir í álopsspælinum. Riggar tað ikki, so sláa vit kalt vatn í blóðið og royna umaftur, sigur Heini Hanusarson millum annað við heimasíðuna hjá Neistanum og leggur afturat:

- Teir spæla fullkomiliga uttan sjálvsálit, meðan vit spæla við stórum sjálvsáliti. Vit hølvaðu teir av, staðfestir Heini Hanusarson í viðmerking við heimasíðuna hjá Neistanum.

## Vit hjálptu teimum als ikki

- Teir einastu av okkum, sum eiga rós fyri sítt avrik leygardagin, eru málverjarnir. Teir stóðu væl, hóast vit í verjupartinum als ikki hjálptu teimum.

Tað staðfestir vónbrotni Torvald Abrahamsen úr Kyndli. Hann sigur, at leygardagurin í øllum førum ikki var dagurin hjá teimum grønu.

- Nei, tað var tað so ikki. Neistin spælur væl, meðan okkara avrik er eyðmýkjandi. So fær ikki verið øðrvísi, sigur Torvald Abrahamsen, sum lovar, at Kyndil fær uppreisn í heimadystinum móti H71 komandi vikuskiftið.

### Neistin – Kyndil 35-21 (16-8):

# Kyndil hevði ongan møguleika

**Neistin staðfesti trygt sína oddastøðu leygardagin, tá bláa høvuðsstaðarfelagið vann við 14 málum á Kyndli**

Neistin bukaði grannarnar grønar. Neistin hølvaði Kyndil av. Neistin var nógv best í høvuðsstaðnum. Neistin lat Kyndil úr.

Yvirskriftirnar kundu verið fleiri. Men tað er satt, sum tað er sagt. Kyndil hevði ongan møguleika í grannabrakinum móti Neistanum í høllini á Hálsi leygardagin. Eldra høvuðsstaðarfelagið vann greitt og staðfesti sína støðu sum oddalið í bestu mansdeildini.

### Gott tol

Janus Einar Sørensen, Bárður Johannesen, Hans Áki Dal-Christiansen, Høgni Klein og hinir á liðnum hjá Kyndli líktust ikki sær sjálvum á vøllinum leygardagin. Allir avrikaðu væl undir tað, teir plaga, og tað var serliga tí, at Neistin slapp at renna undan grannunum frá byrjan.

Einki skal hinvegin takast frá avrikinum frá eldra høvuðstaðarliðnum. Tí tað var sanniliga eisini teimum at takka, at munurin gjørdist so stórur. Serliga í álopspartinum høvdu teir tol og dirvið, hóast 10 mál skiltu liðini. Tað er teimum rós uppiborið.

Tróndur Kragesten var fyri fyrstu ferð í hesum kappingarárinum við á liðnum hjá Neistanum. Hann royndist væl eftir umstøðunum, hóast mótstøðan lítið og einki gjørdi við at verja fyri honum og viðleikarunum.

### Tóku Hanusarson úr

Dia Midjord, venjari hjá Kyndli, gjørdi ymsar broytingar í royndini at standa móti trýstinum frá grannunum. Eitt av uppskotunum var at mansverja Heina Hanusarson, sum skeyt tvey av málunum hjá Neistanum. Tað gav sjálvsagt verjupartinum hjá Kyndli meira pláss at verja í, og tað gagnnýtti oddaliðið til fulnar.

Jugoslav Djumic og David Edvardsen vóru bestu málskjúttarnir hjá Neistanum. Teir skutu átta mál hvør. Janus Einar Sørensen og Hans Áki Dal-Christiansen skutu fimm mál hvør fyri Kyndil.

uni